# TÍÐINDI

SAMBAND
KÁRI MIKKELSEN
KARIM@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Hvøkkur á ferðafólk tá Smyril møtti Brimli





*Nógv ferðafólk gjørdust kløkk, tá Brimil og Smyril møttust í tjúkkari toku í smølu siglingarrennuni á Trongisvágsfirði*

*Savnsmyndir*

**Vandi kundi møguliga staðist av eini hending á Trongisvágsfirði í síðstu viku, tá Smyril og Brimil møttust í tjúkkari toku. Sjálvt um fleiri ferðafólk gjørdust skakk av hendingini, siga skipararnir seg hava havt fullgott tamarhald á støðuni**

SIGLING
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Sigling í tjúkkari toku kann í sjálvum sær altíð vera vandamikil og serliga í eini smalari siglingarrennu, sum tann á Trongisvágsfirði. Hetta var eisini støðan fríggjakvøldið, tá Smyril skuldi av Tvøroyri, meðan vaktar- og bjargingarskipið, Brimil, var á veg inn. Sjálvt um ilt var at síggja fram um nøsina, syrgdi tekniska útgerðin umborð fyri, at manningarnar á skipunum báðum vistu av hvørji aðrari.

Leysasøgur hava gingið um, at ongin skuldi vera á brúnni á Brimli, men hetta avvísa bæði skiparin á vaktarskipinum og á ferðamannaskipinum.

– Vit vóru fýra-fimm mans á brúnni, sigur skiparin á Brimli, Julian Juul.

Skiparin á Smyrli, Niels Harald Michelsen, váttar, at alt var sum tað skuldi umborð á Brimli. Skipini høvdu ikki minni enn tvær ferðir telefoniskt samband við hvørt annað.

Hinvegin eru skipararnir ikki heilt samdir um mannagongdina, tí skiparin á Brimli skjeyt í fyrstu samtaluni upp, at skipini skuldu møtast bakborð-bakborð. Men stutt áðrenn tey møttust, vildi skiparin á Smyrli heldur møtast stýriborð-stýriborð, av tí at Smyril var á veg norðureftir. At hesi boðini vórðu broytt, undrar skiparin á Brimli.

Hann heldur eisini, at Smyril hevði nakað nógva ferð, tá tey møttust. Spurdur um kontraboðini frá skiparanum á Smyrli og nógva ferðin kundi elvt til vandastøðu, sigur skiparin á Brimli.

– Ja, tað kundi tað, sigur Julian Juul.

Hesum er skiparin á Smyril, Niels Harald Michelsen, ikki samdur í.

– Vanliga sigla vit 20-22 míl, meðan ferðin hjá okkum í hesum føri bert var 14-16 míl. Og tá vit høvdu Brimil plottaðan inn, so dugi eg ikki at síggja, at ferðin var ov høg, sigur Niels Harald Michelsen.

Hann heldur, tað kanska var eitt sindur óheppið, at Brimil júst skuldi vera í siglingarrennuni, júst tá Smyril skuldi norðureftir, men sigur:

– Sjálvandi hava vit ikki einkarrætt til at sigla har, men vit hava eina ferðaætlan at halda okkum til, so í einum slíkum føri, hevði verið betri, um onki annað skip var á leiðini, sigur Niels Harald Michelsen.

## Dreygaði ógvusliga

Ferðafólk upplivdu tað soleiðis, at Smyril dreygaði knappliga, og at hetta í sama viðfangi virkaði ógvusligt, samstundis sum Brimli kom undan kavi í bert 30-40 metrar frástøðu.

Hesum hava skipararnir forstáilisi fyri, tí alt virkar størri og ógvusligari í toku.

Skiparin á Smyril boðaði beinanvegin stjóranum á Strandferðsluni frá hendingini. Hetta váttar Dánjal Andreasen.

– Eg havi fingið frágreiðing frá skiparanum, og hesa eri eg nøgdur við, sigur strandferðslustjórin.

Hann avvísir, at hendingin fær nakað eftirspæl.

Manningin hevur handlað, sum hon eigur at gera í slíkum føri, so har er onki at finnast at, sigur Dánjal Andreasen.

Kvøldið eftir møttust skipini aftur á somu leið, men leygarkvøldið var tokan uppaftur tjúkkari, og tí sóu ongi ferðafólk nakað til Brimil.

Borgarstjórin:

# Vit hava samlað ólavsøkuna



*Heðin Mortensen, borgarstjóri*

**Áður hevur ólavsøkan verið í tveimum, men mentanarligu tiltøkini um allan miðbýin hava samlað ólavsøkuna, sigur ein sum heild nøgdur borgarstjóri**

ÓLAVSØKA
*Bjørk K. Olsen*
*bjork@sosialurin.fo*

– Eg kann sum tað fyrsta siga, at flest fólk hava verið á hesa ólavsøkuna, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn. Fólk samlaðust alla tíðina á Tórsgøtu og á Vaglinum, tí har var skipað fyri so nógvum tiltøkum, og fólk hava tikið væl ímóti hesum.

Fólk vóru í sera góðum lag og jalig, greiðir borgarstjórin frá.

## Fyrr var ólavsøkan í tveimum

Áður var ólavsøkan í tveimum, orsakað av nógvu tiltøkunum í Kommunuskúlagarðinum og somuleiðis uttanfyri hann. Vaglið hevur næstan bara miðnáttarsangin og ólavsøkusetanina.

– Í ár er pallur settur upp uttanfyri tinghúsgarðin við nógvum tónleiki og tiltøkum fyri bæði børnum, ungum og gomlum. Eisini í Tórsgøtu húsar Reinsaríið eina rúgvu av tónleiki, og barnavinalig tiltøk vóru á parkeringsplássinum uttan fyri Hvonn, greiðir ein nøgdur borgarstjóri frá. Cafémentanin í Vágsbotni dragaði eisini fólkið til sín, og Nólsoyar páls torgið var ongantíð oyðið.

## Natúrligt forhold til alkoholmentan

Nógv pappírsdálking var, men ikki vóru nógvar brotnar fløskur á gøtuni, greiðir borgarstjórin frá. Tórshavnar kommuna hevur áður skipað fyri fløskuinnsamling, sigur Heðin Mortensen, og longu fyrsta árið, var fløskudálking reduserað niður í eina helvt.

- Vit hava jú fingið skeinkjustøð kring miðbýin. Fólk hava fingið eitt natúrligt forhold til alkohol, og mentanin er broytt til tað betra. Fólk noyðast ikki at drassa fløskur við sær oman í býin, tí at tað ber altíð til at finna sær fram á okkurt drekkandi, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri.

Fólk vóru skikkilig á ólavsøku

- Fólk vóru í góðum lag og tóku jaligt ímóti øllum, og tá er minni harð- og fullskapur. Fólk vóru ikki boysin men glað. Nú eru eisini nógv borð og stólar stillaði upp í miðbýarøkinum, ið ger, at fólk koma í friði og náðum og seta seg. Har, fólk eru, koma fleiri fólk. Tað skapar hugna, sigur borgarstjórin.

Gjøgnumførd ólavsøka

Vit eru sera glað fyri hesa ólavsøkuna, ið hevur verið. Tiltøkini hava verið gjøgnumførd,og fólk um alt landið hava tikið hesum væl ímóti. Nógv størri mentanarligt innihald er komin í ólavsøkuna, og tað hevur ótrúliga nógv at siga, at vit hava lagt aftur at tað siðbundna.